UTTAN ÚR HEIMI

Haiti undir í vatni

Gloprarregn elvdi um vikuskiftið til vatnflóð í Haiti, og sambært myndugleikunum eru minst 57 fólk druknað.

Ringast stendur til í landspartinum Artibonite har norðuri í landinum, tí har fór áin Laquinte upp um bakkarnar og legði stór øki undir í vatni. Nógv hús skolaðu burtur, og bæði vega- og telefonsambandið slitnaðu. At kalla allur býurin Gonaives stendur undir í vatni, og myndugleikarnir siga, at fleiri fólk í býnum eru ikki komin afturíaftur. Umleið 380 fólk í býnum eru flutt á sjúkrahús.

Tað nógva avfallið í Haiti komst av tropiska storminum Jeanne, sum undan vikuskiftinum herjaði í Dominikanska Lýðveldinum, sum er hin parturin av oynni Hispaniola.

Arbeiðspláss í vanda

Vandi er fyri, at 375.000 donsk arbeiðspláss verða niðurløgd tey næstu árini, annaðhvørt tí at tøkni fer at gera mannahendur óneyðugar, ella tí at danskar fyritøkur velja at flyta sítt virksemi til onnur lond.

Tað er niðurstøðan í einari kanning, sum stovnurin Rambøll Management hevur gjørt. Christian Bason, sum starvast á stovninum, sigur við danska útvarpið, at talan er um einki minni enn eina kollvelting á danska arbeiðsmarknaðinum. Hann sigur, at nógv arbeiðspláss í træ- og pappírsídnaðinum eru í vanda, og at tað sama er galdandi fyri tey, sum gera innbúgv. Heldur ikki tey, sum arbeiða í jarn- og metalvinnuni, kunnu kenna seg trygg, sigur Christian Bason.

Donsku fakfeløgini siga seg longu kenna sviðan av, at fleiri fyritøkur velja at flyta sítt virksemi til lond í Eysturevropa ella Asia, tí at arbeiðsmegin er bíligari har. Lillian Knudsen, sum er formaður í Kvindeligt arbejderforbund, sigur, at tey flestu ófaklærdu arbeiðsplássini í Danmark fara at hvørva eftir fáum árum.

Haider tapti

Tann víðgongdi eysturríkski politikarin Jørg Haider og flokkur hansara vóru fyri einum lemjandi ósigri á einum landspartavali sunnudagin.

Val var í landspartinum Vorarlberg, og har fekk Frælsisflokkurin hjá Haider bara 13 prosent av atkvøðunum ímóti meiri enn 27 prosentum á valinum fyri fimm árum síðani. Harafturímóti fekk tann konservativi Fólkaflokkurin hjá Wolfgang Schússel, forsætisráðharra, eitt gott úrslit. Flokkurin fekk 55 prosent av atkvøðunum, og tað var níggju prosentstig meiri enn í 1999. Andstøðuflokkarnir, Sosialdemokraturnir og Tey Grønu, fingu ávikavist 16,8 og 10,2 prosent.

Undirtøkan hjá Frælsisflokkinum og Jørg Haider hevur verið tøðugt minkandi síðani tjóðartingsvalið fyri fýra árum síðani. Tá fekk flokkurin 27 prosent av atkvøðunum og slapp í stjórnarsamgongu.

Eiga at bíða við upphøgging

Russisku myndugleikarnir hava gjørt av at høggja tað 252 metrar langa kjarnorkuherskipið "Admiral Ushakov" upp, men norski umhvørvisfelagsskapurin Bellona vil hava russar at bíða við tí.

"Admiral Ushakov" er bygdur í 1980. Krússarin er eitt av teimum størstu herskipunum, sum russar hava, men tey seinastu fimm árini hevur hann ligið við bryggju í Arkhangelsk. Sambært russisku myndugleikarnir eru kjarnorkureaktorarnir umborð á skipinum í lagi, og tað sama verður sagt um tær 20 kjarnorkurakettirnar, sum krússarin hevur. Kortini vilja russar sleppa at høggja krússaran upp nú.

Norski umhvørvisfelagsskapurin Bellona hevur í fleiri ár roynt at avmarka vandan fyri dálking frá teimum gomlu sovjetsku kjarnorkuherskipunum, men Bellona heldur, at russar hava fleiri onnur før, sum eru í nógv verri standi enn "Admiral Ushakov". Eitt nú liggja fleiri kavbátar í Murmansk, og teir áttu ruuuar at høgt upp fyrst, sigur Bellona.

Putin oyðileggur russiska demokratiið

Seinasti forsetin í Sovjetsamveldinum, Mikhail Gorbatjov, og fyrsti forsetin í Russlandi, Boris Jeltsin, leggja Vladimir Putin undir at beina fyri demokratisku gongdini í Russlandi

Avgerðin hjá Vladimir Putin, forseta at savna valdið í Russlandi fer at gera russiska demokratiið veikari. Tað halda undanmenn hansara

RUSSLAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Í síðstu viku kunngjørdi russiski forsetin, Vladimir Putin, at hann ætlar sær at savna valdið í landinum. Eitt nú skal hann sjálvur tilnevna guvernørarnar í teimum einstøku landspørtunum, valskipanin skal broytast, og forsetin skal hava betri eftirlit við fjølmiðlunum. Endamálið er at styrkja Russland í bardaganum ímóti altjóða yvirgangi.

Men nógvir russar ivast í, at yvirgangurin er tann veruliga orsøkin, og teir leggja Putin undir at útvega sær sjálvum alt valdið og at seta demokratiið til viks.

Tey, sum mótmæla forsetanum, fáa nú stuðul frá tveimum kendum fyrrverandi russiskum politikarum. Mikhail Gorbatjov, sum var tann seinasti forsetin í Sovjetsamveldinum, og sum legði lunnar undir eitt demokratiskt Russland, sigur við blaðið Moskovskie Novosti, at ætlanin hjá Putin er eitt afturstig fyri demokratiið.

– Skalt tú berjast ímóti korrupsjón, mást tú hava eitt frælst tjóðarting og frælsar fjølmiðlar, men tað er tað øvugta, sum nú hendir, sigur Gorbatjov.

Undanmaður Putins í russiska forsetaembætinum, Boris Jeltsin, er samdur við Gorbatjov.

– Skerja vit tey demokratisku rættindini, er tað yvirgangurin, sum hevur vunnið. Bara eitt demokratiskt samfelag skal berja yvirgangin niður, sigur Jeltsin við Moskovskie Novosti.

Ein kendur russiskur viðmerkjari, Aleksandr Golts, segði við útvarpið Ekho Moskvy sunnudagin, at Putin nýtir gíslatøkuna í Beslan sum eitt høvi til at beina fyri teimum seinastu leivdunum av demokratiinum, sum russar fingu, tá Jeltsin var forseti. Ístaðin fyri at søkja at yvirgangsmonnunum, søkir hann at demokratiinum, segði Golts.

Nazistar fáa aftur vald í Týsklandi

Fyri fyrstu ferð í 36 ár hava teir týsku nýnazistarnir fingið umboðan í einum landspartatingi

TÝSKLAND
Árni Joensen:
fartekst@mail.dk

Veljararnir í týsku landspørtunum Sachsen og Brandenburg vístu sunnudagin, at teir eru sera misnøgdir við viðurskiftini í tí, sum fyrr var Eysturtýskland. Arbeiðsloysið har liggur um 20 prosent, og avgerðirnar hjá stjórnini at skerja tær almennu veitingarnar hava ikki bøtt um støðuna.

Tí fingu sosialdemokratarnir ein frammaná, og tað sama hendi tí konservativa CDU, sum skipar landspartastjórn í Brandenburg saman við sosialdemokratunum. Atkvøðurnar fóru ístaðin út á ytsta høgra og ytsta vinstra vong. Í Sachsen fingu nýnazistarnir 12 umboð í landspartatingið, og í Brandenburg fekk tann gamli kommunistaflokkurin stóra framgongd og næstan líka nógvar atkvøður sum sosialdemokratarnir.

Hetta er fyrstu ferð í 36 ár, at teir týsku nýnazistarnir fáa umboðan í einum landspartatingi.

– Valið í Sachsen er ein stórur sigur fyri tað týska fólkið, segði høvuðsvalevnið hjá nýnazistunum, Holger Apfel, sunnukvøldið.